

Tríggjar av kvinnunum á Sansum: Durita Simonsen, Eydna Simonsen og Anya S. Midjord



Høgni Rasmussen og Edvard Heen, stjóri á Tryggingarfelagnum Føroyar

ur á allari klótuni. Tað er í metropolunum har tolsemi og margfaldni er størst, at størsti útviklingurin og búskaparvøksturin er, segði hann.

- Hetta er eisini ein av orsøkunum til, at Sansir søkja út. Vit fáa lættari arbeiðsmegina í Keypmannahavn enn í Føroyum.

- Vit kunnu lætt koma í ta støðu, at tað verður lættari at fáa dugnaligar føroyingar í Danmark enn í Føroyum. Hví? Tí møguleikarnir eru fleiri aðrastaðni, býirnir eru liviligari, sosiala skipanin betri, skúlamøguleikarnir betri, útbúgvingartilboðini betri, barnagarðstilboðini betri, barslisskipanir betri, mentanartilboðini fleiri og tolsemi størri.

- Alt hetta hevur so við sær, at vit blaka samkynd av landinum, og oman á tað heila blaka vit okkara konufólk av landinum. Vit hava eitt stórt undirskot av konufólki í bólkinum millum 20 og 45 ár. Hvat skulu hetroseksuellir menn gera, tá eingi samkynd eru eftir ella eingi konufólk eru eftir í Føroyum?

- Veruleikin er tann, at vit hava brúk fyri øllum, og at vit eiga at seta kraftugt inn fyri at tiltrekkja so nógv og so dugnalig fólk sum gjørligt. Hetta gera vit bara við at gera Føroyar meira spennandi. Og tað kunnu vit bara gera við at styrkja um okkara metropol: Havnina. Tað er sára einfalt eftir mínum tykki. Stóratjørn ger tað. Og øll nýbyggingin ger tað. Men miðbýurin má eisini styrkjast. Vit kunnu ikki bara hugsa útjaðaramenning. Vit mugu eisini hugsa miðstaðarmenning. Vit mugu seta okkum sum mál, at Havnin skal vaksa nógv næstu árini, og at vit samstundis varðveita tað, sum er vert at varðveita og vaksa um mentanartilboðini og útbúgvingartilboðini. Veruleikin er tann, at um vit ikki seta okkum slík mál, so kunnu vit væl koma út fyri at fólk flyta av landinum. Virki sum Sansir fáa ikki arbeiðsmegi, og so verða Føroyar bara eitt land, har útisetar koma á vitjan eina ferð um árið fyri at síggja okkum innføddu, segði Høgni Rasmussn.

Men hann helt kortini, at nógvir glottar eru at hóma. Stóratjørn gevur vónir. Tunnil millum Havnina og Skálafjørðin skapar dynamikk. Ein nýggjur flogvøllur fer at gera tað lættari at ferðast. Vit byrja at síggja virðini í tolsemi. Tað er vorðið eitt sindur lættari at seta útlendingar í starv. Fokus er komið á okkara kynsdiskriminerandi hugburð. Og vit fara at síggja fleiri kvinnur í týðandi størvum.

- Tað, at vit seta Lenu sum stjóra, er ein partur av hesum útviklingi. Eitt stig á leiðini til eitt betri samfelag, har bæði kynini taka lut. Har vit gagnnýta okkara tilfeingi á besta hátt. Tað er tað, vit royna á Sansum.

- Við Lenu í leiðsluni og okkara fantastiska dugnaligu starvsfólkum, fara vit at royna at geva tykkum eina so góða og fjølbroytta tænastu á samskiftisøkinum sum gjørligt. Vit fara altíð at gera okkara besta. Okkara styrki er, at vit duga at seta okkum inn í tykkara viðurskifti, at vit royna at skilja tykkum so væl sum gjørligt, fyri síðani at skapa samskifti, sum tekur støði í tykkum.

- Hesi evni meta vit, at fólk hava líka nógv brúk fyri í Keypmannahavn, í London, New York, Bombay og Timbuktu. So har fara vit, segði Høgni Rasmussen, stjóri á Sansum at enda í røðu síni fyri nýggja medstjóra hansara á Sansum, Lenu L. Mohr.



Lena L. Mohr, Margret Mortensen og Jancy Gaardlykke



Árni Gregersen, blaðstjóri á Dimmalætting, Sigurð Poulsen, landsbankastjóri og Lena L. Mohr



Hjørdis Samuelsen, Eilif og Katrin Samuseln. Eilif er mammubeiggi Lenu



Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum heilsar nýggja stjóranum á Sansum